

*Sáttmálin ímillum Hest kommunu og Tórshavnar kommunu er nú undirskrivaður, og samanlegg-ingin verður veruleiki 1. januar 2005. Tá verða eisini Nólsoy og Kirkjubøur innlimað í Havnina*

*mynd: Tórshavnar Býráð*

# Hestur partur av høvuðstaðnum

Nólsoy, Kirkjubøur og nú eisini Hestur verða partur av Havnini 1. januar 2005. Sáttmálin ímillum Tórshavnar býráð og bygdarráðið í Hesti varð undirskrivaður mikukvøldið 26.05

1. januar 2005, verður Hest kommuna ein partur av Havnini. Mikukvøldið 26.05 varð sáttmálin undirskrivaður, eftir at hann varð góðkendur á bygdarráðsfundi úti í Hesti týskvøldið. Seinasta leygardag var fólkaatkvøða í Hesti, og har var undirtøkan fyri samanlegging ikki minni enn 100 %.

Ætlanin er, at nógv arbeiði skal gerast úti í Hesti longu í ár, m.a. verður keiøkið asfalterað, garður verður gjørdur um kirkjugarðin og íbúgvarnir fáa eisini eina flótibrúgv.

Vatnveitingin, ið nú er privat, verður kommunal, eins og bygdastovan og svimjihylurin verða løgd undir kommununa.

1. januar 2005 verða eisini Kirkjubøur og Nólsoy innlimað í Tórshavnar kommunu. Tá verður Tórshavn 172 ferkilometrar til støddar, og fólkatalið fer upp um 19.000.

*kelda: www.tórshavn. fo*

**eys**

# Frisørdamur til Kreta á skeið

Nakrar av føroysku frisørdamunum eru í løtuni niðri á Kreta, har merkið, tær umboða á salongunum, skipar fyri hárfríðkanarskeiði. – Øll skeiðini verða hildin úti, m.a. við svimjihylin á hotellinum, greiða frisørarnar á salong Zig Zag frá.

Í hesum døgum er eitt føroyskt ferðalið niðri á Kreta í arbeiðsørindum. Talan er um nakrar frisørdamur, ið eru farnar á skeið. Merkið, ið tær umboða á hárfríðkanarstovunum, nevnt Cutrin, hevur skipað fyri skeiðnum og túrinum. Hetta er triðja árið, at Cutrin skipar fyri skeiði á Kreta, og hini árini hava túrnarnir fingið sera góða umtalu. Tí valdu tær føroysku at taka av, og fara við.

Tað vera eini 100 frisørar við, sum allar umboða Cutrin merkið. Tær skulu á skeið í klipp og farv, uppsetan og kunstigum hári -ella extensions, sum tað eitur á enskum. Skeiðini verða hildin úti t.d. við svimjihylin á hotellinum. Annars verður skipað fyri ymiskum dagtúrum har niðri á Kreta. Hetta søgdu tær á salong Zig Zag, dagin fyri, at spentu frisørdamurnar fóru úr Føroyum.

Við í ferðalagnum eru tær frá salong ZigZag í Havn, Tórhild Kvilt frá Kvilt Hárfríðkan, Katrin Olsen v Toftum og Jórun Sigurðson úr Runavík. Tvær aðrar eru við í ferðalagnum, uttan at skula á skeið, tær eru Nanna, dóttir Tórhild Kvilt og Helen Jacobsen. Tær báðar hildu møguleikan at fara til Kreta vera ov góðan til bara at fara afturvið borðinum, og valdu tískil at taka av tilboðnum um eina sólferiu og knýta seg at ferðaliðnum.

Frisørdamurnar verða væntandi aftur á klettunum 1. juni.

**eys**



*Ferðalagið av frisørdamum, avmyndað vesturi á flogvøllinum, beint fyri fráferðina til Kreta*

*Mynd: jan Müller*


# Gerst sølustjóri hjá Farpack

Farpack skal hava nýggjan sølustjóra. Uppgávan hjá sølustjóranum er at standa fyri øllum innkeypi og sølu. Ein stórur partur av arbeiðnum er at vitja kundar í Føroyum, sum í høvuðsheitum er fiskivinnan, og nakað av ferðing er eisini uttanlands til útvegarar í Norðurlondum.

Sølustjórin hevur ábyrgdina av keypi og sølu og teimum fólkum, sum arbeiða við skráseting, goymslu og fakturering. Hann tekur ímóti og avgreiðir ordrar og fyrispurningar, ger flutningsavtalur og stendur fyri kundavitjanum og kundarøkt.

Tann, vit leita eftir, skal vera dynamiskur, fleksibul og arbeiðssamur. Tú ert vanur við at arbeiða sjálvstøðugt og hevur evnini at leiða. Tú ert opin, fyrikomandi og prátingarsamur, tí tú hevur við fólk at gera, bæði úteftir og inneftir. Útbúgving er ein fyrimunur, men tað er mest umráðandi, at tú hevur royndirnar og kunnleikan til keyp og sølu.

Vit bjóða eitt spennandi arbeiði, góða løn og aðrar ágóðar.

Umsóknarfreistin er 20. juni. Tú byrjar sum skjótast, helst áðrenn 1. august, men ert tú tann rætti, so bíða vit gjarna eftir tær.

Umsóknir verða at senda til:

P/F Farpack
att. Líggjas Joensen, stjóri
Postrúm 3099
FO-110 Tórshavn

P/F Farpack umsitur fyri umleið 50 milliónir krónur um árið. Felagið varð stovnað í 1994 við tí endamáli at útvega pakkitilfar og annað slíkt til fiskivinnuna. Síðan tá er vøruskráin økt, so at vinnan sum heild er okkara kundi, og vit selja eisini uttanlands.

Farpack hevur Føroya størsta úrval av pakkitilfari, pakkiútgerð og pakkiamboðum til alla vinnuna á sjógvi og landi, og vit útvega eisini reingerðarevni, íblandingarevni, trygdarútgerð, arbeiðsklæði, eyðkennisklæði, ymisk tól og ráðgeving í tilevning av pakkitilfari v.m.

FARPACK
Staravegur 5 · P.O. Box 3099 · FO-110 Tórshavn
Tel. 35 30 00 · Fax 35 30 10 · farpack@farpack.fo · www.farpack.com




# Lyfta fremstafingur ímóti Tórshavnar Býráð

**Meirilutin í Tórshavnar Býráð hevur fleiri ferðir brotið kommunulógina, sigur landsstýrið**


KOMMUNUMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


Meirilutin í Tórshavnar Býráð hevur fleiri ferðir hevur fleiri ferðir gjørt seg sekan í at bróta klommunulógina.

Tað staðfestir Innlendismálararáðið hjá landsstýrinum nú.

Tað er nú eitt ár síðani at minnilutin í Tórshavnar Býráðið gjørdi av at kæra býráðssamgonguna fyri landsstýrinum fyri í fleiri førum at hava brotið kommunulógina.

Kæran frá minnilutanum er í fýra pørtum: Í fyrstu atløgu vil minnilutin ikki góðtaka, at mál ferð eftir ferð verða endaliga avgjørd í ymsum nevndunum hjá býráðnum og bara verða løgd fyri býráðið til kunningar.

Hóast minnilutin hevur biðið um at fáa ymisk mál fyri býráðið til viðgerðar, hevur hetta verið sera truplult, verður sagt í kæruni til landsstýrið.

Minnilutin sigur, at hann kann ikki góðtaka, at meirilutin noktar fyri at mál verða løgd fyri býráðið til viðgerðar.

Ì hesum sambandi staðfestir Innlendismálaráðið, at tað er altíð er nevndarformaðurin, ella borgarstjórin, sum hava ábyrgdina av, at málini verða avgreidd rætt, og at niðurstøðurnar eru greiðar og verða førdar í gerðabókina.

Og Innlendismálaráðið staðfestir somuleiðis, at áðrenn eitt mál verður sett í verk, kann ein nevndarlimur krevja, at tað verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar.

Men er ivi um eitt mál, er tað bara býráðið sum kann avgera, um tað skal leggjast fyri býráðið, ella um samtyktin í nevndini skal setast í verk.



*Tórshavnar Býráð má broyta mannagongd á fleiri økjum, eftir at Innlendismálaráðið hevur givið minnilutanum í býráðnum viðhald í fleiri kærum*

## Kunnu ikki nokta

Ì aðru atløgu kærdi minnilutin í býráðnum um, at tá ið teir hava serstøður í ymsum málum, ber tað ikki altíð til at fáa tær viðmerktar í gerðabókina.

Eisini í hesari kæruni, gevur Innlendismálaráðið teimum viðhald.

– Í hesum føri er løgfrøðin greið: Hevur ein nevndarlimur ella kommunustýrislimur eina øðrvísi fatan av einum máli, og ynskir viðkomandi serstøðu sína skrivaða í stuttum í gerðabókina, kunnu hvørki nevndarformaðurin ella borgarstjórin, sýta honum tað.

Ráðið staðfestir eisini, at tann, sum førir gerðarbókina -nevndarformaðurin, ella borgarstjórin- hevur ábyrgdina av at fáa greiði á, hvat viðkomandi í stuttum vil hava ført í gerabókina.

Hinvegin ger Innlendismálaráðið eisini greitt, at tað er ikki einhvør viðmerking, sum skal í gerðabókina, men einans tílíkar, sum beinleiðis eru um hvørja øðrvísi støðu viðkomandi kommunustýrislimur hevur í ávísum máli, og hvat hesin heldur, at býráðið átti at tikið avgerð um.

Í triðja lagi vil minnilutin ikki góðtaka, at meirilutin í býráðnum alment er í ferð við at geva føstu nevndunum heimild til at taka avgerð í málum, um at játta pening til byggiætlanir, projekteringar og verkætlanir, soleiðis at viðkomandi mál ikki longur koma fyri býráðið til viðgerðar ella avgerðar.

Í hesum sambandi heitir Innlendismálaráðið á býráðið um at gera mannagongdirnar viðvíkjandi nevndum og uppgávum og heimildum teirra soleiðis, at nevndirnar ikki fáa heimild at játta pening til ymisk endamál.

Somuleiðis eigur at verða lagt upp fyri, at tá ið mál um fíggjarviðurskifti verða løgd fyri býráðið, skal eitt ummæli frá fíggjarnevndini fylgja við.

Annars staðfestir Innlendismálaráðið eisini, at tá ið peningur skal játtast til barnagarðar, vøggustovur og aðrar stovnar, skal tað viðgerðast og samtykkjast í býráðnum, tá ið tað ikki ítøkiliga er samtykt í fíggjarætlanini, sum býráðið hevur samtykt frammanundan.

– Sostatt kann ein nevnd ikki játta pening ella seta arbeiði í verk, sum kommunustýrið ikki staðiliga hevur játtað pening til, antin á sjálvari fíggjarætlanini ella seinni.

– Tílík mál, sum verða viðgjørd í nevndunum, skulu sostatt leggjast fyri kommunustýrið til avgerðar, sigur innlendismálaráðið.

– Tá ið tað snýr seg um myndugleikan at játta pening er heimildin hjá kommunustýrinum, og hesa heimild kann kommunustýrið ikki lata øðrum - heldur ikki føstu nevndunum, leggur ráðið afurat.

Men so verður skoytt uppí, at hóast játtanarmyndugleikin bara kann verða hjá kommunustýrinum, verður kortini mett, at ein nevnd, eftir umstøðunum, kann taka avgerð um at seta smærri arbeiðir ella tiltøk í verk, sum hava við vanligt virksemi í eini kommunu at gera, hóast kommunustýrið ikki nágreiniliga hevur tikið støðu til viðkomandi arbeiðið í øllum førum.

Hvørji hesi smærri tiltøkini kunnu vera velst m.a. um, hvør siðvenja er galdandi í kommununi, og annars er tað kommunustýrið, sum ger av. Aftrat hesum kemur, at er ivi um neyðug játtan er til tiltakið, tá ber altíð til hjá einum nevndarlimi at nýta íhaldsrætt sín og at krevja málið fyri kommunustýrið.

– Hinvegin er greitt, at jú størri og týdningarmiklari ein ætlan er - bæði politiskt og fyri almenningin - jú størri verða krøvini til at ein ítøkilig játtan er til ætlanina. Hesi viðurskifti mugu tí altið avvigast í ítøkiliga førinum.

Og í fjórða lagi klagaði minnilutin um, at borgarstjórin hevur latið einstøkum kommunustýrislimi, sum eisini er partur av samgonguni í býráðnum, upp í hendi at gera ávíst arbeiði fyri kommununa, uttan at hetta hevur verið boðið alment út frammanundan.

Í hesum sambandi er Innlendismálaráðið av teirri fatan, at í hesum føri er ikki grundarlag fyri at finnast at framferðarháttinum.

Men tað samsvarar best við lógina, um kommunustýrið tekur støðu til, hvørji mál kunnu verða avgreidd uttan útboð, eins og almennar leiðreglur eiga at verða fyri, nær kommunustýrislimir kunnu átaka sær arbeiðir uttan útboð, sigur Innlendismálaráðið.

# Hava onga avtalu fingið um arbeiðstíðina

**Skúlaleiðarar vilja hava avtalu um arbeiðstíðina, áðrenn næsta skúlaár byrjar í august**


FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


Játtanin til fólkaskúlan er skerd í ár, afturímóti undanfarna ári.

Tað staðfesta skúlaleiðararnir í Føroyum, nú teir hittust á limafundi fyrr í vikuni.

Einir 50 skúlaleiðarar úr øllum landinum vóru møttir á fundinum, har teir staðfestu, at skerjingin hevur ført við sær, at skeiðvirksemi hjá lærarum og undirvísingin sum heild, verða skerd.

Men hetta taka teir til eftirtektar og staðfesta, at soleiðis er politiski viljin, siga teir í einum tíðindaskrivi eftir fundin.

Men av tí sama halda teir eisini, at málið um, at vit skuldu hava besta skúla í Norðanlondum í 2007, nú má endurskoðast.

Teir vísa eisini á, at í løtuni er ongin avtala um arbeiðstíðina hjá skúlaleiðarunum.

– Seinasta heyst var arbeiðsbólkur settur at greiða hetta málið, men hetta arbeiðið steðgaði, tí Mentamálaráðið skuldi kanna ymisk viðurskifti, sum skuldi vera fortreytir, at arbeiðið í bólkinum kundi halda fram.

– Men onki hoyrdist aftur. Fundur skuldi vera 18. februar, emn varð útsettur. Og higartil eru ongi fundarboð komin, sigur Skúlaleiðarafelagið.

Teir siga, at longu í august verður farið undir næsta skúlaár og framvegis er ongin avtala um arbeiðstíðina.

Samstundis vísa teir á, at arbeiðið hjá skúlaleiðslunum er munandi økt síðani, eitt nú síðani ársverkið hjá lærarunum varð sett í verk fyri einum ári síðani.

Og skúlaleiðarafelagið heitir staðiliga á Mentamálaráðið um at fáa arbeiðsbólki til verka aftur beinanvegin, so at ein nýggj avtala um arbeiðstíðina kann fáast í lag í hesum skúlaárinum.